## Óvanligar gávur

Tað verður ofta tikið til, at menn lova olmussur burtur, tá nógv stendur á, og soleiðis tóktist tað eisini vera í skiftirúminum hjá B36 eftir dystin leygardagin.

Meðan spælararnir í ovfarakæti feiraðu gullið, komu brádliga eini heldur óvanlig boð inn í skiftirúmið. Ein av viðhaldsmonnunum hjá felagnum, sum eisini er koyrilærari, segði stutt og greitt, at um nakar B36'ari ikki hevði koyrikort, so var bara at tekna seg til frálæru hjá honum. Kostnaðin skuldu teir í øllum førum ikki hugsa um, helt hann.

Og tað var í øllum førum nakað, sum fall í góða jørð. Fleiri av yngstu monnunum hava enn ikki koyrikort, og tí kom hetta væl við hjá hesum.

Og eisini seinni um kvøldið fingu teir áminning um, at hetta var nakað heilt serligt.

Sonny Johannesen hevur í mong ár verið ein av dyggastu B36-viðhaldsmonnunum, og nú gullið var komið til høldar, vildi hann eisini sleppa at heiðra liðnum.

Hetta varð gjørt á tann hátt, at allir spælarar vórðu bodnir heim til hansara til ein bita, áðrenn farið varð í B36-húsið. Og tað skuldi merkjast, at talan var um gullveitslu. Spælararnir fingu nevnliga knív og gaffil úr 24 karat gullið, tá maturin stóð á borðinum.

- Hetta er bestikk, sum eg keypti konuni í 1984. Tá hevði eg við Snodda júst gjørt besta túrin, sum nakað føroyskt skip hevði gjørt fram til tá, og tí vildi eg keypa eitt hvørt minni um hetta. Tað bleiv so til hetta settið úr gulli, sum eg gav konuni. Men eg veit ikki. Hon hevur ongan tíð vilja brúkt tað, so nú helt eg, at spælararnir skuldu fáa æruna av hesum, staðfesti fegni B36'arin og rokskiparin.

-mørk

B36-HB 2-1 (0-1):

# Gávur góvu grann

**Eina løtu hevði HB hondina á gullinum í Gundadali, men tvær sjádsama stórar gávur góvu grannunum sigurin, sum hóast alt eisini var uppiborin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Fyrsti kossurin. Nýggja steypið fyri Formula-deildina er júst handað Pól Thorsteinsson, ið soleiðis varð tann fyrsti, sum slapp at mussa steypið.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Tit hava longu fingið tvær gávur frá okkum, so vit hava onga gávu við hesaferð.

Orðini átti onkur av HB-spælarunum, sum komu yvir í gullveitsluna hjá B36 leygarkvøldið. Og heilt skeiv mundu tey heldur ikki vera. Tí var tað ikki fyri tveir katastrofalar brølarar frá tveimum royndum HB-arum, so kundi reyð/svarti parturin av Gundadali helst rópt seg føroyameistara fjórða árið á rað.

### Móti dystargongdini

Skal takast saman um dystin, so man intensitetur vera orðið, sum best lýsir hetta seinasta brakið. Longu hálvan tíma undan dystinum vóru skýlini við felagshúsini um at vera full, og spakuliga byrjaði stóra skýlið eisini at fyllast.

Og tá dysturin fór ígongd, stóð eisini skjótt greitt, at menn vóru tendraðir. Frá fleiri síðum hevði annars verið tosað um, at dysturin væl kundi gerast sum langur talvleikur fyrsta tíman ella so, men hetta hendi ongantíð. Serliga B36 tóktist sera agressivt fyrstu løtuna, og møguleikar spurdust eisini burturúr.

Allur syðri endi av Gundadali mundi farið uppfrá, tá Allan Mørkøre ta einu ferðina stóð púrasta blankur, men onkursvegna legði hann bóltin fram við stólpanum úr stuttari fjarstøðu. Og í fleiri øðrum førum gjørdist talan eisini um hálvar og heilar kjansir, sum Bárður Johannesen tó hevði tamarhald á.

Men tað var tó ikki bara B36, sum sat á øllum. HB hevði kanska eitt meira verjukent útgangsstøði, men hinvegin, so gekk tað við fullarið ferð, tá liðið so fór niðan eftir vøllinum. Ikki minst gav tað B36 høvuðbrýggj, at kantarnir hjá HB vóru so skjótir avstað. Og einar tvær ferðir hevði Svend F. Jacobsen góðar skotroyndir, tá hann samlaði upp út fyri brotsteigin.

Sum dysturin leið, so fall ferðin á spælinum nakað. Tað var ikki hugsingur um, at nakar partur kundi halda á við somu ferð í samfullar 90 minuttir. Eina løtu móti endanum royndi B36 aftur at seta ferð á. Og uttan iva skuldi Bergur Midjord lagt teir á odda, tá hann misnýtti størsta møguleikan í dystinum við at smekka bóltin beint í krovið á spraklandi HB-málverjanum.

Og so hendi tað, sum ikki mátti henda fyri B36. HB HB revsaði uttan náði, tá teir fingu møguleikan. B36 var annars frammi í horna, tá HB ruddaði bóltin burtur. Tað eydnaðist Jákupi á Borg at sneiða Klæmint Matras av sær, og komin móti brotsteiginum slepti hann til Bárð Mortansson, sum at kalla kíndi bóltinum yvir í longra hornið.

### Kølldømdur deyðastoytur og gávur

Hetta var sum vátur vøttur hjá B36 at fáa, og eina góða løtu eftir steðgin tóktist tað eisini, sum hevði HB fult tamarhald á støðuni. HB fekk nú frið á sær sjálvum, soleiðis at eyðkendi spælistílurin kundi praktiserast. Bólturin varð róliga koyrdur kring vøllin, meðan bíðað varð eftir avgerandi møguleikanum. Og hesin kom kanska eisini, tá 53 minuttir vóru farnir. Í øll-

um førum var Uni Arge als ikki samdur við linjudóm-

aranum, sum veittraði hann at vera rangstaddan, tá bólt-



### Fakta um dystin

**B36-HB 2-1 (0-1)**
**0-1:** Bárður Mortansson, 44
**1-1:** Allan Mørkøre, 65
**2-1:** Fróði Benjaminsen, 73
**Dómari:** Petur Reinert
**B36:** Jákup Mikkelsen- Kenneth Jacobsen, Klæmint Matras, Pól Thorsteinsson, Alex dos Santos - Mikkjal Thomassen (Bárður H. Joensen, 78.), Ingi Højsted, Fróði Benjaminsen - Bergur Midjord (Levi Hanssen, 90.), Allan Mørkøre, Wellington (Okeke Obele Onyebuchi, 66.)
**GK:** Ingi Højsted, 51., Pól Thorsteinsson, 69.
**HB:** Bárður Johannesen - Halur Danielsen (Hendrik Rubeksen, 83.), Hans á Lag, Rasmus Nolsøe, Janus M. Joensen - Rúni Nolsøe, Svend F. Jacobsen, Vagnur M. Mortensen - Jákup á Borg (Uni Arge, 56.(Jóhannis Joensen, 80.)), Bárður Mortansson, Tór-Ingar Akselsen
**GK:** Hallur Danielsen, 8., Rasmus Nolsøe, 47., Jákup á Borg, 48., Bárður Mortansson, 80.